## Føroya Banki heldur fram

EB/Streymur spælir eisini við búmerkinum hjá Føroya Banka á bringuni tey bæði næstu kappingarárini. Tað varð staðfest leygarkvøldið, tá EB/Streymur skipaði fyri ársvetislu. Føroya Banki hevur verið høvuðsstuðul hjá EB/Streymi tey bæði seinastu kappingarárini, og við tveimum gull- og tveimum silvurmerkjum er einki at ivast í, at talan higartil hevur verið um lukkuligt hjúnarband millum partarnar. Og nú hava teir so fingið pappír upp á hvønn annan tey bæði næstu árini eisini.



## Ronaldinho bjargaði Milan

Tað stóð nógv á hjá AC Milan, tá teir um vikuskiftið spældu á útivølli móti Atalanta. Heimaliðið var á odda 1-0, men við 10 minuttum eftir at spæla, traðkaði Ronaldinho av álvara í karakter. Við eini góðari temjing og knallhørðum skoti fekk hann javnvág í roknskapin. Milan spældi annars størsta partin av seinna hálvleiki við einum manni í yvirtali, eftir at Ivan Raduvanovic hjá Atalanta fekk reytt kort.

# Fekk forðað fyri 2006-endurtøku

**Sámal Erik Hentze, gullvenjari hjá HB, viðgekk eftir seinasta dystin leygardagin, at hann avgjørt hevði hugsað um gummibein og hvussu hann skuldi forðað fyri, at HB endurtók tað, sum EB/Streymur gjørdi í 2006**



Hilmar Jan Hansen

Enn hevur eingin gloymt, hvussu landskappingin endaði í 2006, tá EB/Streymur leingi var klárt á odda, men í evstu løtu misti meistaraheitið, tá liðið seks minuttir fyri tíð mátti lúta fyri KÍ á Mølini á Eiði, samstundis sum HB við tveimum málum í næstsíðsta og síðsta minutti ímóti ÍF í Gundadali fór við øllum.

Ta ferðina var Sámal Erik Hentze hjálparvenjari hjá Piotr Krakowski í EB/Streymi, men hesa ferð var hann høvuðsvenjari hjá HB. Og tað hevur ikki verið sørt, at tankarnir hjá Sámal Eriki hava leitað aftur til endan á kappingarárinum fyri trimum árum síðani.

– Eg minnist slett ikki 2006, tí eg haldi, at eg havi fortrongt tað, sigur hann fyrst skemtandi, tá hann verður spurdur um hesi nógv umrøddu gummibeinini, ið fleiri hildu seg síggja á HB-liðnum í nøkrum av síðstu dystunum.

– Nei, hetta hevur absolutt spøkt, og serliga eg havi hugsað nógv um tað, hvat kundi gerast øðrvísi. Og tað hevur kanska verið ein fyrimunur fyri meg, at eg kanska fingið brúkt hetta. Í øllum førum havi eg kunnað hugt at, hvat kanska var gjørt skeivt tá, samanborið við í dag.

### Droymt um tað

Uttan at koma nærri inn á uppskriftina, kunnu vit í øllum førum staðfesta, at Sámal Erik Hentze onkursvegna fann vegin fram við forðingunum, ið hann og Piotr rendu seg í í 2006, og tí var hann ovurfegin leygardagin, tá hann hevði fingið gullheiðursmerkið um hálsin.

– Henda kenslan er heilt góð. Hetta er fantastiskt og óbeskriviligt. Alla hesa vikuna havi eg hugsað um tað. Tankarnir hava fokið gjøgnum høvdið, og tað er bara heilt fantastiskt. Og skal eg vera púra erligur, so havi eg droymt um hesa løtuna, segði Sámal Erik Hentze.

– Tú hevur altíð ein dreym, og við kappingarbyrjan var málið, at vit skuldu gerast føroyameistarar og taka avbjóðingina upp við øll hini liðini. Eitt er, hvat tú sigur og eitt annað, hvat tú heldur, men tíbetur helt tað allan vegin ígjøgnum. Hetta er bara fantastiskt.. Tað var frálíkt

# Eingin léttur dystur

**– Tað hevur verið ein jøvn kapping í ár við fleiri góðum liðum allan vegin ígjøgnum, og eingin dystur hevur verið léttur, segði FSF-forsetin, Høgni í Stórustovu, áðrenn hann í Sørvági handaði HB meistarasteypið**



Hilmar Jan Hansen

Hóast tað var kalt og illfýsið, vóru mong smílandi og vát andlit at síggja á vøllinum í Sørvági, tá FSF-umboðini skuldu avgreiða sína formligu uppgávu, ið var at handa gullheiðursmerki og steypið, sum meistararnir komandi árið hava sum sjónliga prógvið fyri sínum tjúgunda meistaraheiti.

– HB hevur fyri sættu ferð í 10 ár vunnið FM-steypið, og tað sigur nakað um ein dominans, sum liggur nokk so fast í høvuðsstaðnum, segði Høgni í Stórustovu, FSF-forseti, í síni stuttu røðu inni í trunkanum mitt á vøllinum.

– Eftir fyrsta umfar í ár sá út til, at HB saman við fýra øðrum var til reiðar at taka dystin upp um føroyameistaraheitið. Í teimum avgerandi dystunum ímóti liðunum, ið vóru avbjóðarar, vístu tit styrki og hegni, so tit fingu lagt eina frástøðu.

Síðani nevndi hann eisini nakað um, hvussu tað hevði sæð út síðstu vikurnar, tá hann helt, at HB hevði gjørt sítt til, at kappingin skuldi vera spennandi líka til næstsíðsta umfar.

– Tað hevur verið tosað um »gummibein« síðstu dystirnar, men tað trúgvi eg ikki, tí tað hevur verið ein jøvn kapping í ár við fleiri góðum liðum allan vegin ígjøgnum, og eingin dystur hevur verið léttur, segði Høgni í Stórustovu, áðrenn hann bað »høvuðsmotorin á liðnum«, sum hann málbar seg, Fróða Benjaminsen, um at taka ímóti steypinum.



**Við at vinna innanhýsis toppdystirnar staðfesti HB, at teir vildu verða meistarar, segði FSF-forsetin, áðrenn hann handaði FM-steypið til Fróða Benjaminsen**

**Mynd: Álvur Haraldsen**

## Deiligt at vinna

Pætur Jørgensen, sum alt árið hevur spælt á høgra bakki hjá HB, mátti leygardagin síggja síðsta dystin frá síðulinjuni, tí hann fekk skaða í næstsíðsta dystinum ímóti KÍ.

– Sjálvandi var tað keðiligt, at eg ikki fekk verið við, men tað var øgiliga deiligt at vinna síðsta dystin og so at fáa steypið. Tá 07 Vestur kom upp á javnt, var bara at vóna, at vit kundu fáa eitt mál aftrat, og tað fingu vit eisini, segði ein stórbrosandi Pætur eftir dystin í Sørvági.

– Nú er ein vika, síðani vit vistu, at vit blivu meistarar, men tað er ikki fyrr enn nú, at vit kunnu feira tað ordiliga. Vit hava havt tað stuttligt og hugna okkum hesa vikuna, men nú kann tað vera ordiligt ball.

**hil**

## Líka gott hvørja ferð

Vagnur Mohr Mortensen hevur havt eitt kappingarár, ið fyrst var merkt av sjúku og nú ímóti endanum eisini var darvað av skaða, men hann kom sterkt aftur og spældi allan dystin í Sørvági leygardagin.

– Tað er altíð stuttligt at verða føroyameistari. Vit hava trúð upp á tað alla tíðina, og eg var vísur í, at vit fóru at verða meistarar, segði Vagnur ovurfegin leygardagin, samstundis sum hann vísti aftur, at HB hevði fingið nervar ímóti endanum á kappingini.

– Gummibein óttaðist eg ikki, tí teir flestu hava vunnið tað einar fýra ferðir, so teir eru vanir við trýstið, sum er ímóti endanum. Og tað er tað sama hvørja ferð. Tað er akkurát líka stuttligt hesa ferð, sum tað var síðst.

**hil**

## Vaknaðu í tøkum tíma

Formaðurin í Pf. Havnar Fótbóltur, Jan Otto S. Holm, strálaði sum ein sól í regninum í Sørvági leygardagin, tá hann eftir lokna handan stóð á vøllinum við einum blómutyssi í hondini, sum HB hevði fingið frá 07 Vestur.

– Vit hava ligið á odda alla tíðina, men so vóru tað hasar fýra dystirnar, har vit snávaðu eitt lítið sindur. Men leiðslan hevur verið greið alla tíðina, so hetta var ongantíð tann stóri trupulleikin, segði hann.

– Kappingin hevur verið hørð, men hon hevur víst, at steðgar tú eitt lítið sindur á, so kann tað skjótt enda galið. Vit vaknaðu aftur í tøkum tíma og koyrdu tað heim.

**hil**